KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting:	10.12.2015 kl. 17:30
Málnr.:	13/00245 Gerðabók
Nevndarlimir:	Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen
Varalimir:	Jan Gardar tók sæti fyri Atla S. Justinussen í máli 134/15
Onnur:	Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari:	Jensa Anthoniussen, skrivari

Málsyvirlit			**Síða**
Til viðgerðar			
129/15	15/01109-1	Áseting av fundardøgum 2016 – Klaksvíkar býráð v.m.	2
130/15	13/00899-135	Endurskoðan av ferðslutrygdarætlanini	2
131/15	15/00135-14	Viðv. treytaðari tilsøgn um íløgustuðul til Spinnaríið	4
132/15	15/01134-1	Kavarudding - yvirtrekk	5
133/15	15/01132-1	Gravimaskina o.a. til Vegadeildina	6
134/15	15/00548-19	Byggisamtyktaruppskot - Regulering av økisparti A4 Niðan Horn	7
135/15	14/00900-5	Ums. um sundurbýti av matr. nr. 45 á Strond - US	8
136/15	15/01091-2	Ums. um sundurbýti av matr. nr. 74 í Árnafirði - US	8
137/15	15/01111-2	Ums. um sundurbýti av matr. nr. 1489a - Elisabeth Z. Jacobsen	9
138/15	13/00987-4	Vatnflóð v.m. (garður móti vegi) - Heini Festirstein	10
139/15	15/01128-1	Fígging av tómum plássum í barnaansingini	12
140/15	15/01075-3	Stuðul til hjartastartara til politistøðina í Klaksvík - Føroya Politistafelag	13
141/15	15/00540-5	Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2015 - *seinna viðgerð*	14
142/15	15/00541-5	Eykajáttan til Námsfrøðiligu Ráðgevingina 2015 - *seinna viðgerð*	14
143/15	15/00543-4	Eykajáttan til smábarna Gigna 2015 - *seinna viðgerð*	15
144/15	15/00544-4	Eykajáttan til Húsið 2015 - *seinna viðgerð*	15

129/15
15/01109 Áseting av fundardøgum 2016 – Klaksvíkar býráð v.m.

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	129/15	

Frágreiðing um málið:
Býráðið skal við ársbyrjan almannakunngera, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir. Á seinasta býráðsfundinum í árinum avger býráðið vanliga, nær fundirnir fyri komandi árið skulu haldast.

Hesir fundardagar eru í uppskoti til býráðsfundirnar í 2016:

28. januar	23. juni
25. februar	29. september
17. mars	27. oktober
21. apríl	24. november
26. mai	15. desember

Fundir Klaksvíkar býráðs verða vanliga hildnir í býráðshøllini - Nólsoyar Páls gøta 32, Klaksvík.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin:
*§ **13.** Kommunustýrið hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin. ... Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.*

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til uppskotnu fundardagarnar.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotnu fundardøgunum fyri 2016.

130/15
13/00899 Endurskoðan av ferðslutrygdarætlanini

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Ferðslunevndin	01.12.2015	24/15	
2 Tekniska Nevnd	02.12.2015	50/15	
3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	121/15	
4 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.12.2015	56/15	
5 Fíggjarnevndin	08.12.2015	112/15	
6 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	130/15	

Frágreiðing um málið:
Í nevndarumfari í apríl 2014 tóku FeN, TN og FN undir við teknisku umsitin, um at taka av tilboðnum og arbeiðssetninginum frá Rambøll uppá at endurskoða ferðslutrygdarætlanina í Klaksvíkar kommunu.

Síðani arbeiðið við ferðslutrygdarætlanini fór í gongd, er ein frágreiðing um útbyggingina í miðbýnum og skúlabyggingin tikin við í arbeiðið. Frágreiðingin viðv. útbyggingini í miðbýnum er framd og viðheft. Rambøll er í ferð við at ferðslugrannskoða skúlaprojektið, ið Fuglark hevur teknað og ein frágreiðing hesum viðvíkjandi kann væntast til komandi nevndarumfar.

Ferðslutrygdarætlanin fevnir tískil um nútíðar vegakerv og framtíðar verkætlanir, har endamálið er at betra trygdina á verandi vegakervi, og framyvir at tryggja ferðsluna í samband við byggibúgving, skúlabygging v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Endurskoðan av ferðslutrygdarætlanini fjórða hvørt ár, og alt eftir hvussu stór uppgávan er, er neyðugt við fíggjarligari avseting í hesum sambandi.

Verður ferðslutrygdarætlanin samtykt, kemur hetta at seta krøv til íløgur í samband við at betra um vegastrekkir, ið eru útpeikað ella útgreinað í frágreiðingini. Neyðugt er at kanna nærri, og í nøkrum førum projektera, fyri at staðfesta endaliga íløgukostnaðin á tí einstaka vegastrekkinum.

Tilmæli:
Tekniska umsiting mælir til, at endurskoðaða ferðslutrygdarætlanin, dagfest juni 2015, trafiksikkerhedsinspektionen, dagfest 10-06-2015 og trafik ved udbygning af midtbyen, dagfest 10-06-2015, verða grundarlag fyri ferðslutrygdini í Klasvíkar kommunu. Hetta við tí fyri eyga, at núverandi vegakerv og komandi verkætlanir taka støði í omanfyri nevndu ætlan við tilhoyrandi skjølum.

Fyri at tryggja at vegakervið í Klaksvíkar kommunu lýkur samtíðar tørv, krøv og ynskir, umframt at taka hædd fyri møguligum broytingum, mælir tekniska umsiting til, at ferðslutrygdarætlanin verður endurskoðað fjórða hvørt ár framyvir, fyrstu ferð í januar 2018.

UBN 30-11-2015
Nevndin tekur undir við teknisku umsiting dagfest 25-11-2015.

FeN 01-12-2015
Nevndin tekur undir við teknisku umsiting dagfest 25-11-2015.

TrN 01-12-2015
Nevndin tekur undir við UBN 30.11.15.

TN 02-12-2015
Nevndin tekur undir við FeN 01-12-2015, UBN 30-11-2015 og TRN B&U 01-12-2015. Nevndin staðfestir, at eingin peningur er tøkur innan tekniska økið til parkering og neyðugar vegaloysnir í samband við byggingina á Skúlatrød.

FíN 08-12-2015
Nevndin tekur undir við UBN 30-11-2015, FeN 01-12-2015, TrN B&U 01-12-2015 og TN 02-12-2015 og mælir til, at neyðugur peningur til økið á Skúlatrød verður raðfestur innan íløgukarmin 2016.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 08-12-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

131/15
15/00135 Treytað tilsøgn um íløgustuðul til Spinnaríið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	30.11.2015	51/15	
2 Fíggjarnevndin	08.12.2015	107/15	
3 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	131/15	

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagfest 25-11-2015 verur m.a. víst til treytaða tilsøgn frá kommununi, dagf. 2. juni 2015, til grunnin Spinnaríið, har stuðul á 3 mió. kr. verður játtaður/fellur til gjaldingar, tá ið øll verkætlanin við Spinnarínum er liðug. Játtanin stendur við í tvey ár frá 2. juni 2015 at rokna.

Í skrivi frá grunninum Spinnaríið 14. november 2015 verður greitt frá, at byggætalnin er lutað í tvey byggistig, har I. byggistig fevnir um, at verandi bygningur verður settur í stand og væntast at standa liðugur á vári 2017. Tá skal bygningurin eisini lúka øll myndugleikakrøv og kann nýtast sum rábygningur/høli, verður greitt frá. II. byggistig fevnir um nýggja tilbygningin, eystureftir. I. byggistig kostar 6 mió. kr. og II. byggistig kostar 3 mió. kr.

Spinnaríið spyr í skirivinum, um teir kunnu fáa játtað alla tilsøgnina um stuðul frá kommununi – 3 mió. kr, tá ið I. byggistig er liðugt.

Sí annars skrivið frá umsitingini.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlanin

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin avseting er til endamálið.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndin tekur støðu til:

1. skal hildið verða fast við kommununnar skriv frá 2. juni 2015 (*treytað tilsøgn um stuðul*), har allur stuðulin fellur, tá øll verkætlanin er liðug? (I. og II. byggistig)
2. skal verða játtaður ein ávegis stuðul, eftir at I. byggistig er liðugt - t.d. 1,5 mió. kr.?
3. skal verða játtað annað gjald, eftir at I. byggistig er liðugt, sum nevndin ásetur?
4. um ávegis gjald verður játtað, so verður nevndin at áseta seinastu freist fyri, hvussu leingi tilsøgnin um restina av stuðlinum stendur við. (*t.d. á sumri 2018*?)
5. skal freistin fyri tilsøgnini um stuðul, sum ásett er í skrivi kommununnar 2. juni 2015, verða longd?

MeN 30-11-2015
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Jóhann Lützen og Óluva Klettskarð, mælir til, at hildið verður fast við skriv kommununnar 2. juni 2015 til grunnin Spinnaríið um stuðul til verkætlanina.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Eyðstein Ó. Poulsen, mælir til, at stuðulin á kr. 3 mill. verður goldin út, tá ið I. byggistig er liðugt, treytað av, at bygningurin kann verða tikin í nýtslu.

FíN 08-12-2015

Nevndin mælir til at játta 2 mió. kr., ið svarar til ein triðing av fyrra byggistigi. Somuleiðis mælir nevndin til, at nýggj tilsøgn verður gjørd áðrenn býráðsfundin 10. des., sum kemur í staðin fyri treytaðu tilsøgnina frá 2. juni 2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 08-12-2015.

132/15
15/01134 Kavarudding - yvirtrekk

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	02.12.2015	48/15	
2 Fíggjarnevndin	08.12.2015	115/15	
3 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	132/15	

Frágreiðing um málið:
Kavaruddingarkontan, har kr. 100.000,- eru avsettar í 2015 til vetrarhald, hevur dags dato eitt yvirtrekk uppá kr. 572.438,-. Væntast kann, at yvirtrekkið gerst uppaftur størri kanska upp í móti kr. 700.000 við árslok. Um hugt verður eftir ársúrslitum seinastu mongu árini, er hetta als ikki ókent fyribrygdi hjá kommununi.

Nýggja bussleiðin í kommununi setir eisini serligt krav til vetrarhaldið, tí neyðugt er at salta fleiri vegir og brekkur oftari. Veturin 2014/2015 setti serliga stór krøv til vetrarhaldið um alt landið.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Málið ávirkar fíggjarætlanina fyri 2015 negativa vegin, tí avlopið verður upp til kr. 700.000,- minni.

Tilmæli:
Vanlig mannagongd hjá kommununi hevur verið, at taka staðfest yvirtrekk á kavaruddingarkontuni til eftirtektar.
Um nevndir og býráð hinvegin samtykkja eina eykajáttan, skal málið hava tvær viðgerðir í býráðnum, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.
Við hesum verður málið lagt fyri nevndir og býráð til viðgerðar/støðutakan

TN 02-12-2015
Nevndin mælir til, at málið verður tikið til eftirtektar.

FíN 08-12-2015
Nevndin tekur málið til eftirtektar.

Býráðsins samtytk 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við TN 02-12-2015 og FíN 08-12-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

133/15
15/01132 Gravimaskina o.a. til Vegadeildina

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	02.12.2015	47/15	
2 Fíggjarnevndin	08.12.2015	114/15	
3 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	133/15	

Frágreiðing um málið:
Í samráð við formannin í TN leggur tekniska umsiting upp til, at nevndir og býráð geva umsitingini heimild til at útvega bráðfeingis amboð til Vegadeildina fyrst í komandi ári. Talan er um hesi amboð, sum eru bráðfeingis:

Amboð:	Mettur kostnaður (kr.):
Mobila gravimaskinu	1.200.000,-
Silo til vegsalt	150.000,-
Arbeiðsbil	300.000,-
Tilsamans	1.650.000,-

Sum kunnugt hevur Býráðið sett pening av til neyðugt maskinkeyp til Vegadeildina í 2016. Talan er um kontuna *Vegir Íløgur/Maskinur*, har tilsamans 4,9 mió. kr eru settar av í 2016.

Ætlanin er at innheinta tilboð uppá nevndu amboð, og verður førarin av gravimaskinuni eisini hoyrdur um møguligt keyp og um val av maskinu.

Víst verður annars til samskifti millum TN og TU seinastu árini og miðvísa arbeiðið at dagføra amboð og maskinur kommununnar.

Málið um raðfesting av arbeiðum, sum verða fíggjað innan kontuna *Vegir Íløgur*, verður lagt fyri TN í januar 2016. Um tikið verður undir við hesum málinum um amboð til Vegadeildina, verður upphæddin at raðfesta 3,25 mió. kr.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Talan er um mál, sum býráðsnevndirnar heva umrøtt á temafundi í 2015. Tí kann staðfestast, at málið hevur ongar óvæntaðar fíggjarligar avleiðingar í 2016.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt nevndum og býráði til at taka undir við málinum.

(Taka nevndir og býráð undir við málinum, er ætlanin at lýsa verandi gravimaskinu til sølu. Fær kommunan nøktandi upphædd fyri maskinuna, verður hon seld, annars verður lagt upp til, at gravimaskinan verður tiltaksmaskina á Vegadeildini).

TN 02-12-2015

Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 24-11-2015. Nevndin mælir harumframt til, at akkutta støðan við formansbilinum á Vegadeildini verður loyst innan fíggjarætlanina á tekniska økinum í 2015, har økið hjá TN ber 50% og økið hjá UBN 50% av kostnaðinum, sum verður millum einar 350 og 400 tkr.

FíN 08-12-2015
Nevndin tekur undir við TN 02-12-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 08-12-2015.

134/15
15/00548 Byggisamtyktaruppskot - Regulering av økisparti A4, Niðan Horn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	114/15	
2 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	134/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til býráðsviðgerð 09.07.2015 viðv. uppskoti um broyting av A4-økinum Niðan Horn.

Málið hevur ligið frammi til almenna hoyring lógarásettu tíðina, og inn eru komnar 4 kærur:

- 9. november 2015: Borgari mótmælir, at nortið verður við elligamla bøgarðin - sí viðfest skjal I.
- 10. november 2015: Borgari mótmælir, at forni grótgarðurin og aldargomlu teigarnir í Uppsalabø verða tiknir til bygging – sí viðfest skjal II
- 10. november 2015: Borgari mótmælir, at bygt verður á økið – sí viðfest skjal III
- 10. november 2015: Borgari mótmælir, at gamli bøgarðurin og økið omanfyri gomlu búsetingina í Uppsølum fer til bygging (sí viðfest skjal IV). – Heitir á býráðið um at fylgja tilmælinum frá bólkinum at dagføra skrásetingina av bygningum og støðum í Klaksvíkar kommunun at varðveita (sí viðfest skjal V – s. 51 og 55).

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Nevnd og býráð verða at umhugsa málið av nýggjum útfrá innkomnu mótmælunum.

UBN 30-11-2015
Ein meiriluti, Kristian Eli Zachariasen, Jóhan Lützen og Signhild Johannnesen, tekur klagurnar til eftirtektar og mælir til at varðveita verandi økisásetingar. Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Erling Petersen, heldur seg til býráðssamtyktina 09-07-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015

Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum og fór av fundinum. Inn kom næstvaldi á listanum, Jan Gardar.

Atkvøtt varð fyri minnilutatilmælinum í UBN 30-11-2015. Tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (JS, SOJ, GvK, EÓP, EP, JG og HJS) og 4 atkvøðum ímóti (ÓK, JL, SVJ og KEZ).

Jan Gardar fór so av fundinum, og Atli S. Justinussen tók aftur sæti.

135/15
14/00900 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 45 á Strond - Umhvørvisstovan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	118/15	
2 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	135/15	

Frágreiðing um málið:
Málið var til viðgerðar í nevndini 16.02.2015 og í býráðnum 26.02.2015, sum samtykti at beina málið aftur til umsitingina.
Tekniska Umsiting hevur hetta at leggja afturat tilmælinum frá 23.01.2015:
Matrikuldeildin á Umhvørvisstovuni upplýsir, at Umhvørvisstovan umsitur matrikullógina og avgreiðir málið eftir hesum heimildum, meðan kommununnar partur er at ummæla málið út frá ásetingunum í byggisamtyktini og/ella øðrum kommunalum fortreytum.

Tilmæli:
Fyriliggjandi uppskot til byggisamtykt fyri økispart G (landbúnaðarøki) nevnir onki um min. grundøkir. Mælt verður tí til at senda Umhvørvisstovuni málið við viðmerking um, at í kommunalum høpi er onki til hindurs fyri sundurbýtinum.

UBN 30-11-2015
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 24-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 30-11-2015.

136/15
15/01091 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 74 í Árnafirði - Umhvørvisstovan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Árnafjarðarnevndin	19.11.2015	10/15	
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	117/15	
3 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	136/15	

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn dagf. 3.11.2015 um sundurbýti av matr. nr. 74 í Árnafirði. Grundin til umsóknina er, at húsini skulu seljast og mugu tí loysast frá uttangarðsjørðini.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. des. 1962 um matrikulering og sundurbýti – seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir – seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan ikki partur í málinum.

Tilmæli:
Umrødda sethúsaogn liggur í A21 (blandað íbúðar – og vinnuendamál), og mælir Tekniska Umsiting tí til at senda Umhvørvisstovuni málið við býráðsins tilmæli um góðkenning.

Árnafjarðarnevndin 19-11-2015
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 16-11-2015.

UBN 30-11-2015
Nevndin tekur tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 16-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við ÁrN 19-11-2015 og UBN 30-11-2015.

137/15
15/01111 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 1489a - Elisabeth Z. Jacobsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	116/15	
2 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	137/15	

Frágreiðing um málið:
Elisabeth Ziska Jacobsen søkir tann 17. nov. 2015 um loyvi at frábýta eitt grundøki frá trøðni – matr. nr. 1489a við Ziskagøtu í Klaksvík.
Byggisamtyktarliga er talan um økispart A10 (blandað íbúðar- og vinnuendamál), og heimilar byggisamtyktin sostatt frábýti til grundøki.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Lógargrundarlag:
Matrikullógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert viðmælandi partur

Tilmæli:
Mælt verður til at viðmæla umsóknini, treytað av, at ferðslurættur verður tinglisin yvir matr. nr. 1489a sum atkoma millum ætlaða frábýtta grundøkið og almennan veg.

UBN 30-11-2015
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 23-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 30-11-2015.

138/15
13/00987 Vatnflóð v.m. garð móti vegi - Heini Festirstein

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	02.12.2015	49/15	
2 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	138/15	

Frágreiðing um málið:
Eigarin av sethúsunum á matr. nr. 125ar ger í skrivi til kommununa vart við, at stór vatnflóð úr haganum kom á húsini fyri góðum 20 árum síðani, sum hevði sera stóra og óhepna ávirkan á ognina. Sí viðheft skriv og myndir.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Eigarin kemur við tí uppskoti, at kommunan fær ein metur burtur av stykkinum í erva, har ein garður verður gjørdur í niðari síðu av vegnum. Sambært hesum verður vegurin breiðari, og fer hetta at bøta um umstøðurnar hjá grannunum omanfyri. Afturfyri at lata lendi ynskir eigarin, at kommunan stoypir eina formahædd uppá garðin niðanfyri húsini.

Tekniska umsiting hevur umrøtt málið, og semja er um at mæla kommununi til at taka undir við uppskotinum. Neyðugt verður tó at stoypa garðin nakað suður um matr. nr. 125ar. Neyðugt er eisini, at býráðið tekur undir við nevndu marknaumskipan, har kommunan fær ein metur burtur av stykkinum í erva.

Mett verður, at arbeiðið fer at kosta einar 150 tkr.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking

Tilmæli:
Talan er um eitt øki í Klaksvík, har útstykkingin ikki er liðug. Ætlanin hevur verið, at fremja fleiri arbeiðir í økinum samstundis. Vísandi til serligu umstøðurnar í hesum málinum, verður mælt til at fremja arbeiðið skjótast gjørligt. Sambært hesum verður málið raðfest og fíggjað av kontu til *Vegir Íløga* í 2016.

TN 02-12-2015
Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 20-11-2015.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við TN 02-12-2015.

139/15
15/01128 Fígging av tómum plássum í barnaansingini – Status november 2015

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	01.12.2015	54/15	
2 Fíggjarnevndin	08.12.2015	111/15	
3 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	139/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 25. nov. 2015, har greitt verður frá avbjóðingunum, ið nakrir av barnaansingarstovnunum hava av tómum plássum ávísan part av árinum. Fyri teir raktu stovnarnar hevur hetta stóra ávirkan á figgjarligu støðuna og støðuna á stovninum sum heild.

Nú er hetta fíggjarárið um at verða runnið, og tí vil umsitingin finna fígging til undirskotið við flyting millum kontur innan sama kontobólk, har ta í skrivandi løtu sær út til at verða rúm til tess.

Dim. 03261170030 Barnaans.felags – 549020 Inntøkur smærri kommunur	kr. 265.000,-
Dim. 03261170026 Snjallabjalla – 217000 Brúkaragjøld	kr. 60.000,-
Tilsamans	kr. 325.000,-

Upphæddin verður at flyta frá omanfyri nevndu rakstrarstøðum og luta út til dagstovnarnar, sum hava inntøkumiss av tómum plássum. Upphæddin verður lutað út í samsvar við ”Yvirlit – Manglandi foreldragjald”.

– – –

Frameftir fer umsitingin at arbeiða við at finna eina loysn, soleiðis at stovnar ikki koma í hesa støðuna. Umsitingin fer at kanna, hvussu stovnar, sum eru raktir av tómum plássum partar av árinum, kunnu fáa mánaðarligt endurgjald fyri mista inntøku. Helst má ein upphædd setast av á ”*Barnaansing Felags*”, sum er markað til inntøkumiss á dagstovnum, á sama hátt sum systkinaavsláttur og fríplass, ið eisini verður góðskrivað stovnum, tá ið teir hava inntøkumiss vegna hesar umstøður.

Lógargrundarlag:
§ 6 í Dagstovnalógini

Fíggjarligar avleiðingar:
Í dagstovnalógini stendur, at foreldur skulu í mesta lagi rinda 30% av rakstrarútreiðslunum. Í Klaksvíkar kommunu hevur samtyktin um ”lætta til barnafamiljur” tó við sær, at foreldur í 2015 rinda 22% av rakstrarútreiðslunum.

Tilmæli:
Mælt verður til at fíggja inntøkumiss hjá stovnum vegna tóm pláss við at flyta millum kontur soleiðis:

Dim. 03261170030 Barnaans.felags – 549020 Inntøkur smærri kommunur kr. 265.000,-
Dim. 03261170026 Snjallabjalla – 217000 Brúkaragjøld kr. 60.000,-

Mælt verður eisini til, at samlaða upphæddin á kr. 325.000 verður útlutað til raktu stovnarnar í samsvar við "Yvirlit – Manglandi foreldragjald", og at raktu stovnarnir skjótast møguliga fáa fráboðan um henda møguleika, soleiðis at ætlað virksemi kann fara fram ótarnað.

TrN B&U 01-12-2015
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 25.11.15.

FíN 08-12-2015
Nevndin tekur undir við TrN B&U 01-12-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 08-12-2015.

140/15
15/01075 Stuðul til hjartastartara til politistøðina í Klaksvík - Føroya Politistafelag

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	30.11.2015	122/15	
2 Klaksvíkar Býráð	10.12.2015	140/15	

Frágreiðing um málið:
Umsitingin greiðir í skrivi frá umsókn frá Føroya Politistafelag um stuðul til ein hjartastartara til politistøðina í Klaksvík umframt um undirvísing í brúki av hjartastartarum.
Í samráð við formannin í UBN verður málið lagt fyri nevndina, har málið er býtt upp í tveir partar:

- Stuðul til hjartastartara til politistøðina í Klaskvík
- Undirvísing í brúki av hjartastartarum

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin viðmerking.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri UBN til støðutakan, um

1. kommunan kann veita politinum í Føroyum stuðul til ein hjartastartara sambært umsókn,
2. eisini verður støða at taka til spurningin um undirvísing til staðbundin fólk í bygdunum, sum eru partur av Klaksvíkar kommunu. Talan er um 18 fólk, og kostnaðurin er mettur til 25 tkr.

(Um tikið verður undir við málinum, verður neyðugt at samtykkja, hvør høvuðskonta skal bera kostnaðin).

UBN 30-11-2015
Ein meiriluti, Gunvá við Keldu, Erling Petersen og Jóhann Lützen, tekur undir við pkt. 2.
Ein minniluti, Kristian Eli Zachariasen, tekur undir við tilmælinum og mælir til at fíggja av fastognir/rakstur.
Ein annar minniluti, Signhild V.Johannnesen, tekur støðu í býráðnum.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Samtykt við 10 atkvøðum fyri (JS, SOJ, ÓK, JL, SVJ, KEZ, EÓP, EP, ASJ og HJS) at taka undir við soljóðandi broytingaruppskoti frá KEZ: "Mælt verður til at taka undir við pkt. 2 í tilmælinum og at seta hjartastartara upp í kommunala busskýlinum við Sandin."
Ein blonk atkvøða var (GvK).

141/15
15/00540 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2015 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	03.11.2015	47/15	
2 Fíggjarnevndin	10.11.2015	101/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	12.11.2015	115/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.12.2015	141/15	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 12. nov. 2015.

TrN B&U 03-11-2015
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

FíN 10-11-2015:
Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015.

Býráðsins samtykt 12-11-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við Býráðnum 12-11-2015.

142/15
15/00541 Eykajáttan til Námsfrøðisligu Ráðgevingina 2015 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	03.11.2015	48/15	
2 Fíggjarnevndin	10.11.2015	102/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	12.11.2015	116/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.12.2015	142/15	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 12. nov. 2015.

TrN B&U 03-11-2015
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

FíN 10-11-2015:
Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015.

Býráðsins samtykt 12-11-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við Býráðnum 12-11-2015.

143/15
15/00543 Eykajáttan til smábarna Gigna 2015 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	03.11.2015	49/15	
2 Fíggjarnevndin	10.11.2015	103/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	12.11.2015	117/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.12.2015	143/15	

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 12. nov. 2015.

FíN 10-11-2015:
Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015.

Býráðsins samtykt 12-11-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við Býráðnum 12-11-2015.

144/15
15/00544 Eykajáttan til Húsið 2015 - *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	03.11.2015	50/15	
2 Fíggjarnevndin	10.11.2015	104/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	12.11.2015	118/15	
4 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	10.12.2015	144/15	

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 12. nov. 2015.

TrN B&U 03-11-2015
Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

FíN 10-11-2015:
Nevndin tekur undir við eykajáttanini fyri 2015, men at raksturin fyri 2016 verður tikin uppaftur í desember 2015.

Býráðsins samtykt 12-11-2015:
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 10-11-2015.

Býráðsins samtykt 10-12-2015
Einmælt samtykt at taka undir við Býráðnum 12-11-2015.

FRAMMANFYRI NEVNDU MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI